# Sera positivt

SKATTUR
*Jan Müller*

Áheitanin frá nýggja fíggjarmálaráðharranum, Bárði Nielsen til bretskar myndugleikar um at fáa eina dupultskattaavtalu millum londini verður væl móttikin í Bretlandi. Bretar hava svara aftur, at teir eru sinnaðir at kanna møguleikarnar fyri einari dupultskattaavtalu við Føroyar.

Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri segði í eini viðmerking í útvarpinum nú um dagarnar, at hann vónaði, at oljuvinnan, sum enn ikki hevur givið nakað serligt av sær, fer at koma. Hann vísti í hesum sambandi á ónøgdina millum oljufólk, at tey blíva skattskyldug beinanvegin tey seta fótin á land í Føroyum, tvs. um tey koma til ein fund. Tað hevur so skapt eina ávísa ónøgd millum oljufólkini, bæði tey, sum eru her og koma henda vegin, tí tey kennast ikki við hesi viðurskiftini aðrastaðni og tað kemur av, at vit ikki hava nakra dupultskattaavtalu við Bretland.

Bárður Nielsen metir ikki, at vit fara at missa skattainntøkur av hesi orsøk. Við útvarpið sigur hann, at tað, sum hendir er bara, at oljufólkini tíma ikki at hava hetta eyka stríðið við skattauppgerð í Føroyum og tí heldur halda sínar fundir aðrastaðni.

Tað eru nógvir føroyingar, sum arbeiða uttanlands og tí metir landsstýrismaðurin, at vit føroyingar fáa ein størri vinning av at hava dupultskattaavtalu við onnur lond, tí tá varðveita vit skattin í Føroyum fyri føroyingar enn tað vit missa. Hann metir ikki at tað vera so nógvir útlendingar, sum koma her at arbeiða sum føroyingar, sum arbeiða uttanlands.

Vit hava spurt formannin í FOÍB, áhugafelagið hjá oljufeløgunum, Ben Arabo um eina viðmerking til tíðindini. Tað var annars hann, sum reisti málið á eini oljuráðstevnu í Havn herfyri. Síðani tá hevur málið verið reist av FOIB á fundi við nýggja landsstýrismannin í oljumálum og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Ben Arabo sigur, at hetta, sum nú er hent, er sera positivt. -Tað er gleðiligt, at Fíggjarmálaráðið nú hevur fingið samband við bretsku myndugleikarnar og er hetta eitt stórt stig framá. Ein slík avtala kann gera nógv fyri vinnusambandið millum Føroyar og Bretland. Bretland er hóast alt okkara størsti granni og tí burdi tað verið heilt náttúrligt at havt eina slíka dupultskattaavtalu.

VIÐMERKINGAR

# Samkoma Guds

**Richard Danielsen**
*Fuglafirði á grækarismessu 2004*

Verið ongum til ástoyt, hvørki jødum, grikkum ella samkomu Guds! 1. korintbr. 10,32.

Grikkar umboða her allar tjóðir, uttan jødarnar. Tað síggja vit í t.d. rómbr. 3. kapitli. Har nýtir Paulus eisini orðið grikkar í versi 9, men niðurstøðan í versi 19 er, at allur heimurin er sekur fyri Gudi.

Vit hava sostatt tríggjar flokkar her, jødar, heidningar og samkomu Guds.

Jødarnir eru Guds útvalda tjóð. Hesa tjóðina toknaðist Gudi at útvelja, burtur úr hinum tjóðunum, til sítt serliga fólk. Við jødunum hava vit fingið skriftirnar. Lógina í gamla testamenti, sum tyktar okkum til Kristus, galatiabr. 3,24, og náðinnar evangelium í nýggja testamenti, frelsu við trúgv á Harran Jesus Kristus. Av jødunum er eisini Kristus komin eftir holdinum, rómbr. 9,5.

Heidningar eru, sum longu nevnt, allar aðrar tjóðir, eisini vit føroyingar eru í hesum bólki av náttúru, men við trúnni á Kristus gerast vit børn Guds og koma í samkomu Guds, hin triðja bólkin. Samkoma Guds er øll trúgvandi, bæði av jødum og heidningum. Sum Paulus sigur í byrjanini av 1. korintbr.: … til samkomu Guds, sum í Korint er, tey, sum halgað eru í Kristi Jesusi, kallað, heiløg, saman við øllum sum á einum og hvørjum stað ákalla navn Harra okkara Jesu Krists – teirra og okkara. 1. korintbr. 1,2.

Heitið kristin tjóð finna vit ikki í skriftini. At menn kristnaðum heilar tjóðir, enntá við svøri í hond, fingu tjóðina at skifta religión, er ókent í bíbliuni, tað vita vit, tað er ikki tí at tað verður tvíhildið um hetta enn. Tí er tað, at brøðurnir ikki vilja vera við til slíkt sum túsundára hald fyri kristnini í Føroyum. Tí vit kunnu ikki góðtaka læruna um barnadóp og konfirmatión heldur. Vit finna hatta ikki í teimum heilagum skriftunum. Føroya bispur skrivaði í bløðunum her fyri, at hetta var tað, sum skilti fólkakirkjuna og brøðurnar. Hatta hevur hann rætt í. Men tó hvør syndarligt, at tað skal ver aso, at nakað uttan fyri tær heilagu skriftirnar skal skilja okkum. Vit, sum tó einast um ta grundleggjandi játtanina: Jesus er Sonur Guds. Hvør stórt hevði tað ikki verið, um fólkakirkjan, nú hon verður yvirtikin, hevði slept ásletting av nýføðingum. Tit kundu gjørt, sum summar fríkirkjur gera, at bera nýføðingarnar til eina signing. Men hevði fólkakirkjan slept læruni um endurføðing í dópinum og bert prædika Jesus og hann krossfestan til frelsu, ja sagt sum Paulus: »Kristus sendi meg ikki at doypa, men at kunngera evangeliið«. 1. korintbr. 1,17, tá kundi mangt verið øðrvísi.

Kirkjan lærir jú at trúgv skal til, tí er henda læra komin inn, at eitt annað skal svara fyri barnið, hetta er jú heilt fremmant fyri skriftunum. Eg veit ikki akkurát nær henda læra er komin inn, men Hagerups Konversations Leksikon sigur, at barnadópur er »sikkert bevidnet« í seinastuni av aðru øld, og fyrst í fjórðu øld »trængte den igennem som alm. skik«.

Nýføðingar kunnu hvørki trúgva ella vera vantrúgvandi. Trúgvin kemur av tí, sum ein hoyrir. Nýføðingar skilja ikki tað, sum teir hoyra og kunnu tí ikki taka støðu fyri ella ímóti. Hetta skuldi verið óneyðugt at sagt.

Sigmundur Brestisson og aðrir vóru nokk umskyldir, teir høvdu vist ikki so nógv ljós yvir tingini. Men vit, sum liva nú, eftir at skriftirnar hava verið lisnar upp í Føroyum so mong 100 ár, kunnu vit umskylda okkum, um vit ikki fylgja teimum.

Nú havi eg nokk sært mg. Eg eigi nógvar vinir innan fólkakirkjuna, men vit mugu vera ærlig við hvørt annað, ikki minst tá ið so álvarsligt mál er um at tala.




Vika 13, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin á hægsta stigi í 13 ár

Seinasta mánaðin er heimsprísurin fyri olju alsamt hækkaður. Mikudagin í farnu viku kostaði ein tunna av olju meira enn 35 dollarar. Orsøkin til høga prísin er, at OPEC hevur valt at skerja framleiðsluna, hóast høga prísin. Samstunds liggur lítið av olju á goymslum. Hækkandi oljuprísurin økir um samlaða prísvøksturin í heiminum, og um prísurin heldur stigið, kann hesin, sum frálíður, føra við sær hægri langar lánsbrævarentur.

Eftir fundin í amerikanska tjóðbankanum (FED), har rentustigið sum væntað var varðveitt, greiddi Alan Greenspan frá, at tey nú eru enn meira vís í, at búskaparliga framgongdin er komin fyri at verða. Kortini er FED vorðið eitt vet meira stúrið um støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Boðini frá FED ávirka fíggjarmarknaðirnar hvør sín veg, men undirstrika enn einaferð tann týdning, ið støðan á arbeiðsmarknaðinum í USA hevur á rentustigið í heiminum.

Roknskapurin hjá Vestas í farnu viku var misjavnur. Úrslitið fyri 2003 gjørdist verri enn væntað og verri enn Vestas áður hevði givið ábendingar um. Hinvegin vóru væntanirnar um 2004 hampuligar. Vestas verður í næstum lagt saman við NEG Micon, og framhaldandi felagið verður áhugavert, millum annað tí at Vestas og NEG Micon ikki hava verið leiðandi á somu marknaðum.

Hósdagin og fríggjadagin kunngerða ávíkavist Hennes & Mauritz og A.P. Møller - Mærsk (APM) roknskap. Meðan veiki dollarin ávirkar APM skeiva vegin, hevur høgi oljuprísurin góð árin á inntøkurnar. Kaupthing metur, at áhugavert er at keypa APM á kursstigi niðanfyri 47.000, til langtíðar íløgu.

Í farnu viku gingu gitingar um, at ein av ovastunum í Al-quada, var kringsettur. Stundum hava gitingar ávirkan á fíggjarmarknaðirnar, serliga tá tunnligt er við tíðindum annars. Burtursæð frá vikuligu tølunum um arbeiðisloysisstuðul úr USA, verður tunnligt við fíggjartíðindum hesa vikuna. Í so máta verður vikan ikki hendingarrík, men av tí at marknaðarsemja sýnist at vera um, at renturnar eru vorðnar ov lágar, eru møguleiki fyri at hesar kunnu hækka í vikuni. Partabrøvini kunnu væntast at verða óstøðug aftur hesa vikuna.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,34% | -0,05% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 3,36% | -0,02% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 4,05% | -0,01% | ↓ |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 267,3 | 0,1% | ↑ |
| OMX, Svøríki | 670,3 | -1,5% | ↓ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.624,6 | -0,9% | ↓ |
| S&P 500, USA | 1.109,8 | 0,5% | ↑ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 109,77 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 166,99 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 78,19 | 0,0% | → |
| Altjóða Vøkstur | 62,69 | -0,9% | ↓ |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 606,31 | -0,2% | ↓ |
| EUR | 744,68 | -0,1% | ↓ |
| GBP | 1.112,17 | 1,4% | ↑ |
| NOK | 88,08 | 0,2% | ↑ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*





# Bjargaðu manni í soknum báti

**- Í ringu alduni var bátur undir viðhvørt, og síðan stakk stavnurin uppundan aftur. Við vrakið flutu kassar, timbur, bjargingarvestar og stivlar. Í fyrstani sóu vit ongan mann. Tá ið vit sóu mannin, sum í alduni stundum fleyt omaná, og stundum var undir, hekk hann í bandinum, sum var bundið um stavnin á bátinum. Maðurin var í ongum vesti og ongum yvirlivilsisbúna, sigur kollfirðingurin, Christian Christiansen, sum saman við bátsfelaga sínum, Jens Joensen, bjargaði útróðrarmanni á Norðhavinum mánadagin**

BJARGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var um reppið, at ein útróðrarmaður læt lív á Norðhavinum mánadagin. Av berari tilvild sigldi ein bátur úr Kollafirði við tveimum monnum umborð seg fram á ein føroyskt bygdan bát, sum lá ógvuliga tungur í vatnsskorpuni.

- Tað var keðiligt í sjónum, og vit høvdu avgjørt at gevast at fiska um middagin. Tá ið vit vóru einar fýra fjórðingar úr landi á veg inn í Eiðisflógva, helt Jens Joensen, sum var við mær, seg síggja eitthvørt undarligt í sjónum. Eg sá, at Jens bleiv við at standa og hyggja í bakborð. Vit vendu og fóru at sigla ímóti tí, Jens helt seg hava sæð. Fyrstu løtuna sóu vit einki aftur. Jens helt fyri, at kanska var tað ein boyða, hann hevði sæð. Men tá ið vit høvdu siglt eitt lítið bil aftrat, sóu vit ein føroyskt bygdan bát, sum var sokkin, men stóð steyrrættur í sjónum við forstavninum uppúr. Stundum var stavnurin undir, og stundum stóð hann uppúr vatnsskorpuni – alt eftir, hvussu aldurnar gingu, sigur Christian Christiansen, sum eigur bátin, Elin C.

Hann sigur, at við vrakið flutu kassar, timbur, bjargingarvestar og stivlar.

- Í fyrstani sóu vit ongan mann. Tá ið vit sóu mannin, sum í alduni stundum fleyt omaná, og stundum var undir, hekk hann í bandinum, sum var bundið um stavnin á bátinum. Maðurin var í ongum vesti og ongum yvirlivilsisbúna.

Christian og Jens boðaðu beinanvegin MRCC Tórshavn frá tí, ið hent var.

### Stutt eftir…

- Tá ið vit høvdu fingið mannin, sum var kaldur og ógvuliga illa fyri, uppí bátin hjá okkum, greiddi hesin frá, at báturin hjá honum, Norðstjørnan, hevði fingið ein sjógv og varð koppaður í einum. Hann hevði ikki havt stundir at latið seg í bjargingarvest ella nakað sum helst. Hann var lopin á bláman, sum hann stóð fyri ikki at fara til botns við bátinum.

Christian sigur, at maðurin segði lítið og einki – uttan so, at teir spurdu hann.

- Hann var ógvuliga móður, men púra klárur. Eg haldi ikki, hann hevði fingið nakran serligan sjógv í seg, tí hann hostaði ikki., tó at hann stundum var undir og stundum omaná. Maðurin helt, at hann hevði hingið eina góða løtu í endanum í bátinum, tá ið vit komu fram á hann.

Christian heldur ikki, at maðurin hevði livað leingi aftrat, um teir ikki av tilvild vóru komnir fram á vrakið í sjónum.

- Eg trúgvi neyvan, at maðurin hevði hildið út nógvar minuttir aftrat undir teimum sera ringu umstøðunum, ið vóru.

Sjálvur metir Christian, at vóru teir ein, tveir ella tríggjar minuttir seinni, var maðurin ikki á lívi.

### Fleyt av luft

- Báturin var frambygdur og fleyt av luftini, sum stóð har frammi í húsinum. Tískil hekk hann við forstavninum uppi í sjónum. Christian Christiansen sigur, at tað var ógvuliga heppið, at bátsfelagi hansara, Jens Joensen, sá vrakið í sjónum.

- Vóru vit farnir framvið, er ilt at síggja, at nøkur vón hevði verið um bjarging, sigur bátseigarin.

Á Eiði stóð sjúkrabilur fyri teimum, tá ið teir komu til lands og flutti útróðrarmannin á Landssjúkrahúsið.



*Útróðrarbátar á Eiði*
*Savnsmynd*

# Fiskiveiðu samráðingar við Ísland

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, og íslendski fiskimálaráðharrin, Árni M. Mathiesen, hittust í Havn í gjár at røða um fiskiveiðiavtaluna millum Føroyar og Ísland**

SAMRÁÐINGAR
*Tíðindaskriv*

Viðvíkjandi føroyska botnfiskiskapinum undir Íslandi samdust partarnir um, at heildarkvotan í íslendskum sjógvi í 2004 verður tann sama sum í 2003 ella 5.600 tons. Av hesi heildarkvotu verður toskakvotan óbroytt 1.200 tons, og kalvakvotan verður framhaldandi 80 tons.

Partarnir viðgjørdu eisini fiskiskapin eftir uppsjóvarfiskasløgum og samdust um at halda fram við verandi avtalu. Sambært henni kunnu íslendsk skip í føroyskum sjógvi veiða 2.000 tons av heystgýtandi sild og 1.300 tons av makreli, meðan føroysk skip í vertíðini 2004/2005 kunnu veiða 30.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi. Herumframt kann føroyska lodnukvotan á 10.000 tons í grønlendskum sjógvi verða fiskað í íslendskum sjógvi.

Eftir áheitan frá Bjørn Kalsø, landsstýrismanni, játtaði íslendski fiskimálaráðharrin í samráð við Noreg og Grønland at taka upp spurningin um at viðurkenna Føroyar sum strandarland í lodnuhøpi.

Partarnir eru samdir um, at teir seinni í ár fara at umrøða møguleikan hjá íslendskum og føroyskum skipum at avreiða uppsjóvarfisk hvør hjá øðrum.

Partarnir samdust harumframt um at halda fram við verandi avtalu um at kunna fiska svartkjaft og norðhavssild av teirra egnu kvotum í sjóøki hjá hvørjum øðrum.

# Ung og epilepsi

**Hvussu er at vera ungur við epilepsi? Hóskvøldið fer Epileptikarafelagið at skipa fyri ungdómskvøldi, har greitt verður frá hesi ósjónligu sjúku**

FUNDUR

hugnakvøldi, har greitt verður frá um epilepsi. Meta av Fløtum og Charlotta av Váli Olsen hava báðar verið á informatørskeiði í Danmark fyri at læra seg at upplýsa um epilepsi. Tær hava vitjað fleiri skúlar, har greitt hevur verið frá sjúkuni. Um onkur ynskir at fáa tær út á skúlar, barnagarðar, pen-

og Magni Poulsen, ið báðir eru kendir skemtarar, og sum eisini báðir hava epilepsi, at greiða frá, hvussu tað er at liva við epilepsi. Tiltakið er serliga vent móti ungum við epilepsi og vinfólkum teirra. Okkurt verður eisini til matna. Epilepsi er í sær sjálvum ikki ein sjúka, men heldur eitt fyribrigdi, ið

sum oftast frá fáum sekundum til 2 - 3 minuttir.

Fleiri sløg eru av epilepsi, og eisini er rættiliga ymiskt, hvussu álvarslig herðindini eru.

Í Føroyum verður mett, at umleið 400 fólk hava epilepsi. Í Epileptikarafelagnum, sum í ár hevur 15 ár á baki, eru 120 limir.

Randfríð Sørensen, for-

sjálvt um tey kunnu tó fáa herðindini av og á. Í dag eru nógvur góður heilivágur fyri epilepsi, so ein kann sleppa undan at hava ov nógv herindir.

Tiltakið hjá Epileptikarafelagnum verður hóskvøldið klokkan 19 í MBF-húsinum á Íslandsvegi 10 í Havn.